# Miðlamjørr

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein / Inna Törnroos

Tað verður so ofta tosað um eitt 'vanligt' húsarhald. Hvar ER tað? Ella hvat er eitt óvanligt húsarhald?
**Maður, 40 ár**



*Eg verði kannað av monnum á flogvøllum, og vaktarmenn siga ofta »sir« við meg. Tað hevur helst okkurt at gera við, at eg eri so høg og brúki ikki nógv av varrastift. Fólk halda helst ikki, at eg kann verða ein kvinna.*

Skotski Oscar-virðisløntí sjónleikarin Tilda Swinton (Entertainment Weekly)



Eg kann ikki bara finna eitt talent, dyrka tað, og einki bjóða tí eftir seinastu sendingina. Tað gongur ikki.

Fyrrverandi X Factor dómarin Remee heldur, at DR hugsar bara um at fáa hyggjarar – og ikki um luttakararnar í X Factor. (Ekstrablaðið)

To all airline pilots who are flying to the Faroe Islands for the first time. Notice: Æðuvík is not an uplighted airport, it´s just a small village with a range of Christmas lights. So don´t land in Æðuvík! Roger??
**Maður, 42 ár**



*- Eg vænti, at tað kann ræða menn, at eg eigi so nógvar pengar*

Emma Watson, filmsstjørna úr Harry Potter filmunum (The Sun)



*Eg fari hvørki at vátta ella avsanna, at eitt tílíkt skriv fyriliggur, og eg fari heldur ikki at gera viðmerkingar til nærri innihaldið í skrivinum.*

Løgtingsmaðurin Magni Laksáfoss á tingsins røðarapalli

*- Tað finst eingin króna, sum ikki kemur onkustaðni frá. At samráðast um ein sáttmála við lønarhækkan merkir, at onkur skal rinda.*

Landsstýrismaðurin Jørgen Niclasen um sáttmálasamráðingarnar (Vágaportalurin)

Tey fylgdu abbanum til gravar. So spurdi smádrongurin pápan: "Selja tey øl í himmiríki?" "Nei", svaraði pápin. "So verður abbi skjótt aftur", segði drongurin.
**Kvinna, 36 ár**



Nú bleiv so tíbetur onki verkfall á hesum sinni. Men eftir handilshillunum fríggjadagin at døma, eru tað nøkur, sum eiga wc pappír til tey næstu tvey, trý árini.
**Maður, 55 ár**

*Tað er keðiligt at finna út av, at tú ikki er líka attraktiv, sum tú einaferð vart.*

46 ára gamla sjónleikarin Courney Cox (bangshowbiz.com)

